# Játtanin til heilsuverkið er

## Sjúkrahúsverkið 2007:



Sosialurin fór í gjár undir eina greinarrøð í trimum pørtum, har Jákup Petersen, yvirlækni á Landssjúkrahúsinum, hevur eina bersøgna gjøgnumgongd av støðuni í føroyska sjúkrahúsverkinum.

Í blaðnum í gjár umrøddi hann støðuna ímillum tey trý sjúkrahúsini og hann nemir við, hvussu leiðslubygnaðurin á Landssjúkrahúsinum er ein forðing fyri at menna sjúkrahúsverkið.

Í øðrum parti, sum verður prentaður niðanfyri, vísir hann á, at játtanin til sjúkrahúsverkið er økt einar 100 milliónir, uttan at nakað er fingið burturúr av týdningi. Og í triðja parti vísir hann á, at ein broytt játtanarskipan kundi ført til kapping, so at brúkarin fær betri tænastu fyri lægri prís.



**Eftir fólkatalinum er sjúkrahúsverkið í Føroyum eitt tað dýrasta í norðurlondum. Men at halda fram at hækka játtina er sum at tveita peningin út ígjøgnum vindeygað, sum støðan er nú**

*Jákup Petersen, yvirlækni*

**2. partur**

**Játtanin til føroyska sjúkrahúsverkið økt umleið 100 milliónir krónur, uttan at nakað er fingið burturúr av týdningi. Vit liggja nú frammarlaga í játtan, javnmett við okkara grannar.**

Seinastu 10 árini er játtanin til Klaksvíkar Sjúkrahús vaksin umleið 5 milliónir krónur. Játtanin til Suðuroyar Sjúkrahús er vaksin umleið 10 milliónir krónur og játtanin til Landssjúkrahúsið er vaksin knappar 60 milliónir krónur.

Harafturat er uttanlandskontan vaksin so mikið nógv, at vit nú brúka meira enn 100 milliónir krónur meira um árið til sjúkrahúsverkið, enn vit gjørdu fyri 10 árum síðani.

Hevur hesin vøkstur í játtanini til sjúkrahúsverkið givið ávøkstur? Ella er tað so, at hesin vøkstur, sum er væl meira enn tann samlaða játtanina til bæði Klaksvíkar og Suðuroyar Sjúkrahús, ikki hevur givið tað úrslit sum politikarnir vónaðu?

Okkara sjúkrahúsverk hevur nú eina játtan sum er á leið við okkara grannalond. Skulu vit nú blint játta meira pening? Higartil hevur økt játtan frá politikarum harafturat í summun førum verið brúkt til onnur endamál enn ætlað varð.

Vit hava lyndi til at sammeta okkum við okkara grannalond í hesum sambandi, men tað eru viðurskifti í teimum ymisku londunum sum gera, at tað er torført at sammeta.

Taka vit tó seinastu tølini frá OECD, sær tað soleiðis út, tá ið roknað verður eftir, hvussu nógvur almennur peningur varð latin til heilsuverkið (her er íroknað sjúkrahúsverkið) í 2004, roknað fyri hvønn borgara:

| | |
|---|---|
| Danmark | 33.800,- kr. |
| Finland | 21.740,- kr. |
| Føroyar | 27.152,- kr. |
| Svøríki | 31.400,- kr. |
| Ísland | 39.111,- kr |
| Noreg | 47.229,- kr. |

Sama ár varð kostnaðurin fyri privata heilsutænastu umroknað fyri hvønn borgara fylgjandi:

| | |
|---|---|
| Danmark | 6.565,- kr. |
| Finland | 6.539,- kr. |
| Føroyar | 3.276,- kr |
| Svøríki | 5.577,- kr. |
| Ísland | 7.801,- kr. |
| Noreg | 9.374,- kr. |

Soleiðis liggja vit hampuliga fyri, tá tað ræður um hvussu nógv tað almenna letur til heilsuverkið. Noreg brúkar mest í kanningini av einhvørjari orsøk.

**Okkara grannalond sammeta ikki síni sjúkrahúsverk, men gera síni egnu verk útfrá heimligum umstøðum og búskapi. Men í Føroyum verður ein ikki tikin í álvara um sammetingar ikki verða gjørdar við Danmark.**

Um Danmark skuldið brúkt líka nógv til heilsuverkið sum Noreg, skuldu teir hækka sína játtan til heilsuverkið umleið 70 milliardir krónur og tað hava teir væl onga ætlan um. Tvørturímóti hvat politikar gera í Føroyum, so gera danir eitt sjúkrahúsverk sum hóskar til teirra viðurskifti og búskap.

Hvørt land eigur sjálvsagt at hyggja eftir síni egnu serligu støðu og búskapi tá tað ræður um skipan av og játtan til heilsuverkið.

Hinvegin, so hava danir at enda tikið til sín, at teir eru aftast í norðanlondum tá ið tað kemur til tól og nýggjar viðgerðarhættir og eru farnir undir eina størri íløgu á hesum økinum. Í Føroyum er líknandi íløga gjørd á Suðuroyar Sjúkrahúsi og Landssjúkrahúsinum og ætlanir eru frammi um, at gera tað sama á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Tað sum veruliga er munur á Føroyum og okkara grannalondum innan heilsuverkið, er, at vit ikki eru komin við innan privatu heilsu tænastu. Skuldu vit lagt okkum upp undir liðina á Danmark, skuldu vit brúkt umleið 13 milliónir krónur meira til privatar heilsutænastur.

Sammett við Noreg áttu vit at brúkt 30 milliónir meira til privata heilsutænastu. So tað sær út til, at tað fyrst og fremst er tann privati sektorurin innan heilsuverkið sum skal styrkjast.

Tá ið tað kemur til sjálvt sjúkrahúsverkið, javnmeta vit okkum sum oftast við Danmark. Havandi í huga, at vit tá uttan iva meta okkum við tað land í Norðanlondum sum hevur vánaligastu úrslitini innan kanning og viðgerð, vil eg tó gera eina roynd.

Tey vánaligu úrslitini hjá Danmark eru eisini áhugaverd í tann mun at norðurlendsk lond við lægri játtan til sjúkrahúsverkið enn Danmark hava betri úrslit. Her kann eg t.d. nevna Svøríki og Finland.

Verður hugt at livialdrinum í norðanlondum, fær Danmark aftur botnkarakter, og sjálvt um livialdurin hækkar, so hækkar hann skjótari í øðrum londum. Hinvegin verður ein ikki tikin í álvara um vit ikki meta okkum við Danmark. So lat okum gera eina roynd.

**Føroysku útreiðslurnar til sjúkrahúsverkið eru av teimum dýrastu í Norðanlondum. Bert amt og len í okkara grannalondum, við stórum og spesialiseraðum sjúkrahúsum, liggja undir liðini á føroysku útreiðslunum.**

Útreiðslurnar til føroyska sjúkrahúsverkið kunnu metast á ymiskan hátt, men eg fari væl ikki heilt skeivur tá eg seti tær til umleið 550 milliónir krónur um árið. Vit eru umleið 48.000 borgarar í landinum og gevur hetta soleiðis 11.458 krónur fyri hvønn borgara um árið.

Sambært danska Indenrigs- og Sundhedsministeriet, vóru í 2004 somu útreiðslur í Danmark 9.308 krónur

Hetta vil millum annað siga, at skulu vit verða sum Danmark so kunnu vit spara umleið 100 mió. kr innan sjúkrahúsverkið. Ella tað sama sum sum alt sjúkrahúsverkið er økt við seinastu 10 árini.

Hinvegin kunnu vit eisini sammeta okkum við Københavns amt sum hevur eina sjúkrahús útreiðslu uppá 8.550 krónur fyri hvønn borgara. Um vit gera hetta verður sparingin umleið 140 milliónir krónur. Og tá liggja vit munandi omanfyri lond sum Finland.

Svenska Heilsustýrið upplýsir at í 2005 vóru teirra útreiðslur fyri samlaða sjúkrahúsverkið umleið 10.000 krónur fyri hvønn borgara. Sum dømi kann nevnast, at fyri Stockholmøkið, sum tekur sær sera nógv av serviðgerðum frá øðrum lenum, so varð henda útreiðsla kr. 11.189 krónur. Hallands len varð nakað bíligari og kostaði samlaða sjúkrahúsverkið í hesum leni 9.152 krónur fyri hvønn borgara.

Finland er so aftur bíligari. Og tað sum kanska kann gera Finland enn meira áhugavert er, at seinastu 10 árini hava teir minkað um samlaðu útreiðslurnar til heilsuverkiið frá 8,3 % til 7,4 % av BTÚ.

**Hátturin at játta pening til sjúkrahúsverkið kann verða ein av orsøkunum til, at verkið er kostnaðarmikið.**

Játtanin sum verður brúkt í dag kann kallast ein rammujáttan. Politikarnir játta eina upphædd til eitt sjúkrahús og vóna so, at hetta sjúkrahúsið fær sum best burturúr.

Tað er ikki lætt hjá teimum at seta krøv í hesum sambandi. Svarið frá sjúkrahúsunum er vanliga ullint og kann ikki brúkast til at meta effektivitet, kvalitet og møguligar rationaliseringar.

Tað liggur í áhuganum hjá sjúkrahúsinum at fáa rammujáttanina økta hvørt ár og í tí sambandi bera fram orsøkir sum tæna hesum endamáli. Rammujáttanin ber ikki í sær nakran áhuga til at økja um effektivitet og kvalitet ella rationalisera og økja tænastuna.

**Farið verður alt meira frá rammujáttan til skipanir sum geva politikarum betri møguleika at verða umboð borgarna og at seta krøv.**

Londini rundanum okkum eru farin frá rammujáttanini sum einasta játtanarhátt. Royndir hava verið gjørdar við at gera serligar kontur innan rammujáttanina, sum takast kann av í samband við ávísar kanningar/viðgerðir út yvir tað sum vanliga verður gjørt.

Hesin peningur kemur so deildini til góðar og kann eisini brúkast til endurút-